# Rhodos – ein føroysk oyggj í summar



*Nógvir føroyingar fara til Rhodos í summar í samband við Oyggjaleikirnar. Rhodos hevur eisini alt, sum føroyingar vilja hava, tá teir fara suðureftir*

Eitt av kendastu ferðamálum hjá norðurlendingum man vera grisku oyggjarnar. Serliga kendar um okkara leiðir eru helst Kreta, Kos og Rhodos. Hesar oyggjar verða nógv vitjaðar av norðurlendskum ferðafólkum. Oyggjarnar hava alt tað, ið ferðafólki dámar: sól, strendur, hav, hugna, náttarlív og søgulig støð.

Í løtuni hava føroyingar helst størstan áhuga í oynni Rhodos, tí at tað er á hesi oyggj, at Oyggjaleikirnir 2007 verða hildnir. Føroyar luttaka við fleiri ítróttagreinum, og nógvir ákoðarar hava longu keypt sær ferðina til Rhodos í summar.

Rhodos liggur bert 18 km frá turkisku strondini. Veðurlagið er gott, og um summarið verður heilt heitt. Orsakað av einum jøvnum vindi tykist hitin tó ikki so ógvusligur.

Náttúran á Rhodos er sera fjølbroytt. Kendastu náttúruumráðini eru Summarfugladalurin, har til ber at síggja túsundvís av summarfuglum í summarmánaðunum og hægsta fjallið Atavarios, har hægsti gudurin Zeus, hevði tempul sítt.

Gamli býarparturin í Rhodos býi er eisini heilt serligur. Hann er eina av miðaldarbýunum í Evropa, ið er best varðveittur, og seinnu árini er hann gjørdur í stand á ein sera vakran hátt.

Rhodos bjóðar upp á eitt stuttligt og fjølbroytt náttarlív. Matstovurnar eru mangar, og tær bjóða bæði internationalan mat og serligu griskar rættirnar. Fyri tey, ið dáma at vera, har lív er í, hevur Rhodos sína tiltiknu barrgøtu, meðan tey, ið betur dáma friðin, kunnu njóta ein góðan bita á einum av matstovunum í gamla býarpartinum.




















